**Tjóðveldi**

Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 106/2010: Uppskot til løgtingslóg um náttúruvernd**

## Uppskot
## til
## løgtingslóg um náttúruvernd

### Kap. I
### Endamál og vernd

*Endamál*

**§ 1.** Lógin hevur til endamáls at skipa náttúruvernd í Føroyum, so at náttúran verður vard á burðardyggan hátt við atliti at margfeldni eins og mentanarminni í landsløgum verða vard. Lógin skal eisini tryggja umstøður hjá fólki at njóta náttúruna, eins og fyrilit fyri altjóða skyldum Føroya, búskapi, mentan og menning um alt landið. Lógin skipar stovnar, fyrilit og mannagongdir fyri náttúruvernd. Lógin tryggjar demokratiska stjórn, fakliga umsiting, økisávirkan, hoyring og rættartrygd.

*Øki lógarinnar*

**§ 2.** Lógin fevnir um alt føroyska umveldið.
Stk. 2. Øll hava skyldu at taka fyrilit fyri endmálinum við hesi lóg.

*Allýsing*

**§ 3.** Lógin skipar vernd av náttúru. Náttúran er samansett av bæði tí livna og ólivna. Hon fevnir um lívverur, teirra (uppruna) lívøki, og vistfrøðiskipanina, tey eru partur av.

### Kap. II
### Náttúruverndarstovnarnir

*Náttúruverndarnevnd*

**§ 4.** Landsstýrismaðurin setir eina náttúruverndarnevnd.
*Stk. 2.* Limirnir í náttúruverndarnevndini verða ein formaður, eitt umboð fyri Umhvørvisstovuna, eitt umboð fyri Náttúrugripasavnið og fleiri serkønir økislimir.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin velur til formann fyri fýra ár í senn ein persón, ið skal vera lógkønur ella fyrisitingarkønur.
*Stk. 4.* Serkønu limirnir í nevndini verða valdir soleiðis, at eitt umboð er fyri hvørt av økjunum Suðuroy, Sandoy, Vágar, Norðstreymoy, Suðurstreymoy, Eysturoy og Norðuroyggjar. Umboðini skulu hava holla vitan um náttúruviðurskifti í økinum, tey skulu umboða.
*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin velur serkønu økislimirnar fyri fýra ár í senn. Kommunur, feløg og onnur kunnu skjóta nevndarlimir upp. Landsstýrismaðurin ásetir mannagongdir fyri, hvussu hetta fer fram.
*Stk. 6.* Umboðini fyri Umhvørvisstovuna og Náttúrugripasavnið eru ikki vald fyri ávíst tíðarskeið, men sita stovnsins vegna.

*Stk. 7.* Fyri hvønn limin verður valdur ein tiltakslimur.
*Stk. 8.* Landsstýrismaðurin ásetir samsýningina til fomannin og hinar limirnar og ber útreiðslur nevndarinnar.

**§ 5.** Tá náttúruverndarmál verða viðgjørd í nevndini, eru formaðurin, umboðið fyri Umhvørvisstovuna, umboðið fyri Náttúrugripasavnið umframt minst eitt serkønt økisumboð við.
*Stk. 2.* Formaðurin útnevnir í hvørjum einstøkum máli minst ein økislim til viðgerð av einstøku málunum, sambært serligum reglum, sum landsstýrisfólkið ásetur.

*Umhvørvisstovan*

**§ 6.** Eftir reglunum í hesi lóg fyrisitur Umhvørvisstovan, sum er stovnur undir landsstýrismanninum, øll náttúruverndarviðurskifti, ið ikki eru løgd til landsstýrismannin ella annan myndugleika ella stovn at fyrisita.

*Náttúrukærunevndin*

**§ 7.** Landsstýrismaðurin setur náttúrukærunevndina, ið verður mannað við fimm limum, sum verða valdir fyri fýra ár í senn. Fyri hvønn limin verður valdur ein tiltakslimur.
*Stk. 2.* Formaðurin skal vera lógkønur.
*Stk. 3.* Tveir limir skulu vera kønir í lívfrøði, jarðfrøði, náttúruvernd, mentanararvi ella tílíkum.
*Stk. 4.* Tveir limir skulu vera kønir innan búskap, býarskipan, byggifrøði, fyrisiting ella tílíkt.
*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin kann áseta, at náttúrkærunevndin verður samskipað við aðrar kærunevndir.
*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin ásetur samsýningina til fomannin og hinar limirnar og ber útreiðslur kærunevndarinnar.

## Kap. III
## Frágreiðing og umfevnandi náttúrufriðingar

*Frágreiðing um náttúruvernd*

**§ 8.** Fjórðahvørt ár skal landsstýrismaðurin leggja fyri Løgtingið til umrøðu frágreiðing, har týdningarmikil náttúruverndarviðurskifti verða lýst.
*Stk. 2.* Í frágreiðingini skal millum annað verða greitt frá:
1) almennu støðuni í náttúruni, eitt nú um hótt landsløg, djóra- og plantusløg, og dálkað sjóøki og áir,
2) støðuni í umfevnandi náttúrufriðingum og týðandi náttúruverndarmálum, eisini í kærumálum,
3) gongdini í avgerðarmálum, eisini í kærumálum,
4) kunngerðum, ætlaðum lógarbroytingum og annars øðrum, ið kann hava týdning at skipa náttúruvernd í framtíðini.

*Umfevnandi náttúrufriðingar - atlit*

**§ 9.** Til tess at varðveita ávís sløg av landslagi, lívøki, jarðfrøði, djóra- ella plantusløgum, jørðildi, gróðri, mentanararvi, søgu- og siðvenjuminnum, náttúrueyðkennum, útsýni og vakurleika, fríðtíðaráhugamálum ella tílíkum kann landsstýrismaðurin taka stig til umfevnandi friðingar og at stovna tjóðgarðar.
*Stk. 2.* Hesar friðingar kunnu fevna um størri øki á landi ella í sjónum ella friðingarevni, ið ikki eru tengd at ávísum økjum.
*Stk. 3.* Umfevnandi náttúrufriðingar kunnu fata um og hava til endamáls:
1) at samskipa fleiri smærri friðingar,
2) at friða størri øki, ið eru ogn hjá almennum stovnum ella ogn Føroya fólks,
3) at friða størri privat øki, í samráð við eigarar ella eftir ognartøku, í

báðum førum møguliga fyri endurgjald.

*Stk. 4.* Umfevnandi náttúrufriðingar kunnu partvíst friða ávís øki ella ávís atlit í einum øki. Nærri treytir og fyrilit verða greiðliga ásett í hvørjum føri.

*Umfevnandi náttúrufriðingar - mannagongd*

**§ 10.** Landsstýrismaðurin skipar umfatandi náttúrufriðingar.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin hoyrir Umhvørvisstovuna og náttúruverndarnevndina og skipar fyri víðkaðari hoyring, ið skal fevna um:

1) at lýsa ætlanina væl og virðiliga í almennum høpi,
2) at skipa fyri kunning og hoyring á almennum fundi,
3) at hoyra eigarar, brúkarar, áhugafeløg og –bólkar,
4) at hoyra kommunur og aðrar myndugleikar, og
5) annars at ganga fram eftir mannagongdunum í kap. VI.

*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin fyrireikar uppskot til løgtingslóg um tær einstøku umfevnandi friðingarnar og stovnsetan av tjóðgørðum.

## Kap. IV
## Náttúruverndarmál

*Avgerðarmál*

**§ 11.** Umhvørvisstovan tekur avgerð í øllum vanligum málum um náttúruvernd, undantikið tá talan er um víðfevndar friðingar og stovnan av tjóðargørðum, jvf. § 10, umframt heilt serligum førum, jvf. § 13.

*Stk. 2.* Avgerðarmál eru mál, sum kunnu avgreiðast sambært galdandi innihaldsligu ásetingum í kap. V, ásetingum í kunngerð og náttúruverndarsiðvenju, eftir mannagongdunum í kap. VI.

## Kap. IV
## Náttúruverndarmál

*Umsitingarmál*

**§ 12.** Umhvørvisstovan umsitur í samráð við náttúruverndarnevndina mál um náttúruvernd, sum ikki eru avgerðarmál, men snúgva seg um at útinna náttúruvernd alment, eftir ásetingum í kap. VII.

*Týðandi mál*

**§ 13.** Umhvørvisstovan kunnar landsstýrismannin um tey mál, ið stovnurin fyrireikar, og sum stovnurin metir kunnu fáa stóran týdning, antin í sjálvum sær ella sum fordømi fyri onnur mál, ella kunnu viðføra stórar almennar útreiðslur.

*Stk. 2.* Í heilt serligum førum kann landsstýrismaðurin boða frá, at hann fer at taka avgerð í málinum. Umhvørvisstovan fyrireikar tá málið liðugt og ger sítt tilmæli í málinum, sum síðan verður latið landsstýrismanninum til endaliga støðutakan.

*Stk. 3.* Týðandi mál kunnu bæði vera avgerðarmál og umsitingarmál.

*Kærumál*

**§ 14.** Avgerðarmál hjá Umhvørvisstovuni, eins og umsitingarmál, ið av røttum heilt ella partvíst eru at meta sum avgerðarmál, kunnu leggjast fyri náttúrukærunevndina eftir mannagongdini í kap. VIII.

## Kap V.
## Náttúruverndar- og friðingaratlit

*Forboð móti náttúruskemd, dálking, inn- og útflutningi*

**§ 15** Atferð, sum skemmur, skaðar ella óneyðuga broytir og/ella dálkar náttúruna, er bannað, serliga:

1) at sløða lutir, eitt nú aliútgerð, landbúnaðarútgerð, bilar og aðrar brúktar lutir og burturkast,
2) at fara illa um,
3) at lata útbúnað forfalla
4) at taka grót, sand, eyr, leir, plantur, djór, mosa, flag, mold, torv,
5) at grava, byggja, spreingja ella á annan hátt umskifta náttúruna,
6) at koyra við akførum uttanfyri kommunu- og landsveg ella øðrum eftir siðvenju nýttum vegum í sambandi við røkt av landbúnaði ella tekniskum útbúnaði uttangarðs, uttan so, at serstakt loyvi er givið frá landi ella kommunu at koyra í avmarkaðum øki, sett av til endamálið,
7) at lata dálkandi evni renna í løkir, áir og á sjógv uttan serstakt loyvi,
8) at leggja frá sær, grava niður ella stoyta burtur dálkandi evni á landi ella sjógvi uttan serstakt loyvi.

*Stk. 2.* Atferð eftir stk. 1 er tó loyvd, tá tað snýr seg um atburð, ið er góðkendur í sambandi við náttúruverndarætlanir ella friðingar ella byggi- og býarskipan, ið er mett sambært hesa lóg.

*Stk. 3.* Tá tað snýr seg um skilagóðan, vanligan ella neyðugan atburð, serliga um tað snýr seg um vanliga røkt og rakstur hjá høgum, virkjum, eigarum, brúkarum, kommunum ella øðrum stovnum, kann Umhvørvisstovan eftir umsókn geva loyvi til frávik frá forboðnum í stk. 1, nr. 4 – 8. Frávik kunnu verða treytað og tíðaravmarkað.

9) *Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann gera serstakar reglur fyri loyvi at taka grót, sand, eyr, leir, plantur, djór, mosa, flag, mold, torv til privata ella vinnuliga nýtslu.

**§ 16.** Bannað er at innflyta djór og plantur uttan heilsuváttan og serstakt loyvi. Loyvið verður ásett í samsvari við galdandi lógir og sáttmálar við onnur lond, og landsstýrismaðurin lýsir í kunngerð reglur fyri innflyting av djórum og plantum.

*Stk. 2.* Bannað er ferðafólki at útflyta djór, plantur, steinar og annað tilfar úr føroysku náttúruni.
Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta serligar reglur fyri undantaki.

*Forboð móti bygging*

**§ 17.** Í hesum økjum er ikki loyvt at byggja bygningar, seta upp konstruksjónir ella broyta lendi:
1) nærri sjóvarmálanum enn 100 m frá hægstu fjøru,
2) nærri áum og vøtnum enn 300 m, har áin er minst 4 m breið, har hon er breiðast, ella vatnið er 1 ha til støddar,
3) nærri friðaðum landsløgum o.ø. enn ásett í sambandi við viðkomandi friðing,
4) í teimum økjum, sum eru friðað sum B-økisfriðing ella hægri. Øll øki uttangarðs verða í hesum høpi roknað sum B-øki, til annað er ásett.

*Stk. 2.* Loyvt er tó at byggja, seta upp konstruksjónir og broyta lendi í nevndu økjum:
1) har Umhvørvisstovan hevur viðmælt býar- ella byggiskipan, ið loyvir slíkum,
2) har Umhvørvisstovan loyvir ítøkiligum ætlanum eftir umsókn.

*Stk. 3.* Tá ásett er á korti fyri alt landið sbr. § 38, hvørji øki eru fevnd av stk. 1, er hetta galdandi fram um ásetingarnar í stk. 1.

*Størri umskifti í náttúruni*

**§ 18.** Ikki er loyvt at fara undir størri umskifti í náttúruni á landi og sjógvi uttan góðkenning frá Umhvørvisstovuni. Størri umskifti í náttúruni er grótbrot, byrgingar, grevstur, nývelting og uppskering av lendi uttangarðs, vegagerð, tunnilsgerð, havnagerð, bygging, sandgrevstur, aling ella onnur størri inntriv í

náttúruna, sum ikki longu eru loyvd eftir galdandi lóggávum.
*Stk.2* Umsókn um góðkenning við neyðugum upplýsingum, ið gera ætlanina skilliga, skal sendast Umhvørvisstovuni, sum setur treytir fyri virkseminum.

*Ítøkiligar friðingar*

**§ 19.** Umhvørvisstovan kann gera av at friða ávís øki.
*Stk. 2.* Umhvørvisstovan skal í mestan mun fara undir friðingar, tá støðiskanningar og verndarætlanir eru gjørdar.
*Stk. 3.* Friðing kann fara fram, tá høvi er til tess, í sambandi við ítøkiliga ætlan, ið verður løgd fyri stovnin, ella stovnurin fær kunnleika um.

*Samskipandi friðingar*

**§ 20.** Tá ið náttúruverndarætlanir eru gjørdar sambært kap. VII, skal Umhvørvisstovan taka stig til friðingar av úrvaldum økjum. Hesar friðingar skulu nærri áseta treytir og tílíkt, skipa náttúruverndina best møguligt, umframt at geva eigarum, brúkarum og øðrum høvi at verja síni rættindi og ávirka málsgongdina.

*Friðingarsløg*

**§ 21.** Friðing skal skipast í hesi sløg av friðing sambært nærri ásettum reglum:
1) A-økisfriðing og A-evnisfriðing er fullkomin friðing, ið skal tryggja óbroytta støðu ella endurreisa eldri støðu, har serlig atlit gera seg galdandi.
2) B-økisfriðing og B-evnisfriðing eru vanligar friðingar, ið skulu tryggja, at støðan higartil heldur fram sum vant uttan stórvegis broytingar, ella øki verða løgd av til ávísa nýtslu við ásettum atlitum.
3) D-økisfriðing og D-evnisfriðing eru almennar friðingar av økjum, serliga uttangarðs og á havbotni, til tess at tryggja, at øki, ið enn ikki eru nóg væl kannað og skrásett, ikki verða broytt, áðrenn Umhvørvisstovan hevur havt høvi at meta um tey.

*Áleggingar og boð*

**§ 22.** Umhvørvisstovan kann áleggja privatum, virkjum, myndugleikum og stovnum at rudda, taka upp, umvæla, rætta, endurskapa ella á annan hátt fremja tað, ið neyðugt er at fyribyrgja broti ella rætta brot á ásetingarnar í kap. V, friðingar, vernd ella aðrar fyriskipanir ella avgerðir eftir hesi lóg.
*Stk. 2.* Fyribils boð um ikki at fara undir ávísar ætlanir ella um ikki at brúka ognir, sum ætlað, kunnu tó ikki leggjast á í meira enn 2 ár, áðrenn endalig avgerð verður tikin.

*At loyva bygging o.t.*

**§ 23.** Í økjum, fevnd av D-økisfriðing, kann Umhvørvisstovan góðkenna ítøkilig ella nærri avmarkað inntriv alment í náttúruna samsvarandi atlitunum til náttúruvernd.
*Stk. 2.* Í økjum, fevnd av B-økisfriðing, kann Umhvørvisstovan góðkenna ítøkilig inntriv, har atlit til endamál sambært aðrari lóg ella vinnuligan ella privatan rakstur, búseting o.t. gera tað neyðugt, um so er, at friðingaratlitini tó kunnu varðveitast eftir greitt ásettari mannagongd, og onnur loysn gerst ov vandamikil, drúgv ella kostnaðarmikil.
*Stk. 3.* Í økjum, fevnd av A-økisfriðing, kann Umhvørvisstovan bert loyva inntrivum á líkan hátt, sum ásett í stk. 2, um so er, at onnur atlit gera tað tvingandi neyðugt, serliga vegna heilsu ella trygd.
*Stk. 4.* Friðingarevni, fevnd av A-, B- ella D-evnisfriðing, verða viðgjørd samsvarandi stk. 1-3.

*At seta treytir*

**§ 24.** Í sambandi við friðing kann ásetast nærri, hvat virksemi, hvørji vanlig inntriv, hvør nýtsla og hvør

ferðsla kann fara fram í sambandi við tað friðaða.
*Stk. 2.* Umhvørvisstovan kann áseta treytir í sambandi við loyvi til bygging og inntriv.
*Stk. 3.* Treytir sambært stk. 1 og 2 kunnu fevna um:
1) tíðarætlan fyri arbeiðið,
2) treytir til tekningar og verkætlanir samvarandi vegleiðingum stovnsins,
3) krøv um nøgdir, mát og mannagongdir í sambandi við inntriv,
4) upprudding, endurskipan ella annað, ið skal tryggja náttúruvernd eftir, at inntrivið er framt ella liðugt,
5) at gera nærri greinaðar árinskanningar fyri egna rokning,
6) aðrar treytir sambært fyrisitingar- ella náttúruverndarsiðvenju.

**§ 25.** Umhvørvisstovan hevur umframt vanligar treytir at áleggja myndugleikum at fylgja náttúruverndaratlitum sambært § 21 hesar heimildir:
1) hon kann, har týðandi náttúruverndaratlit tala fyri tí, áleggja broytingar í sambandi við verandi byggi- og býarskipan,
2) hon skal ummæla allar nýggjar byggi- og býarskipanir, umframt broytingar í galdandi byggi- og býarskipanum, tá tað snýr seg um at víðka um lendið, ið skipanin fevnir um,
3) hon kann áleggja landsmyndugleikum, stovnum kommunum og interkommunalum felagskapum at gera árinskanningar fyri egna rokning ella fyri rokningina hjá tí, sum skal nýta økið.

*Atlit til jarðfrøði, landslag, minni o.t.*

**§ 26.** Umhvørvisstovan kann gera av at friða ella á annan hátt verja ávís sløg av landslagi, jarðfrøði, jørðildi, mentanararvi, søgu- og siðvenjuminnum, náttúrueyðkennum, útsýni, vakurleika og líkum náttúrueyðkennum.
*Stk. 2.* Hesar friðingar kunnu fevna um øki á landi ella í sjónum ella friðingarevni, ið ikki eru tengd at ávísum økjum.

*Lívsløg, djóra- og plantusløg o.t.*

**§ 27.** Umhvørvisstovan kann gera av at friða ella á annan hátt verja lívøki, djórabøli, djóra- ella plantusløg og lík náttúrueyðkenni.
*Stk. 2.* Friðingar kunnu eisini fara fram til tess at skapa nýggjar ella øktar umstøður samsvarandi (1).
*Stk. 3.* Hesar friðingar kunnu fevna um øki á landi ella í sjónum ella friðingarevni, ið ikki eru tengd at ávísum økjum.

*Atlit til fólk, trivna, frítíð o.t.*

**§ 28.** Umhvørvisstovan kann gera av at friða, skipa ella skapa umstøður hjá fólki at njóta náttúruna, eins og jarðfrøðiliga, lívfrøðiliga og mentanarliga margfaldnið.
*Stk. 2.* Hesar friðingar kunnu fevna um størri øki á landi ella í sjónum ella friðingarevni, ið ikki eru tengd at ávísum økjum.
Stk. 3. Friðingar eftir hesi grein kunnu einans vera á B- ella D-støði.

## Kap. VI
## Mannagongdir í avgerðarmálum

*At taka mál upp*

**§ 29.** Avgerðarmál kunnu verða tikin upp:
1) eftir umsókn frá beinleiðis áhugaðum,
2) eftir umsókn frá alment áhugaðum,
3) eftir tilmæli frá náttúruverndarnevndini,
4) eftir meting hjá Umhvørvisstovuni.
*Stk. 2.* Umhvørvisstovan skrásetir øll mál og letur náttúrverndarnevndini tey til ummælis.

*Uppbýti*

**§ 30.** Náttúruverndarnevndin skal til fulnar upplýsa og fyrireika málið, gera tilmæli sítt og síðan leggja tað til Umhvørvisstovuna til endaliga avgerð.
*Stk. 2.* Náttúruverndarnevndin skipar fyri hoyringum og ger tilmæli síni út frá hesi lóg, kunngerðum, landsverndarætlan, økisverndarætlanum og greiðari siðvenju.
*Stk. 3.* Heldur náttúruverndarnevndin, at málið ber í sær prinsippiella støðutakan ella nýskipan, kann nevndin heita á Umhvørvisstovuna um at taka upp slíka støðutakan sum týðandi mál.

*Fyribilsavgerðir*

**§ 31.** Væntar náttúruverndarnevndin, at málið kann taka langa tíð, ella at vandi er fyri, at ognir, virði ella friðingaratlit kunnu fara fyri skeytið innan málslok, kann hon mæla til at áleggja fyribils forboð, friðing, steðg, atgerð ella annað. Tilmæli um fyribilsavgerð skal sjálvstøðugt leggjast fyri Umhvørvisstovuna.

*Avgerðir*

**§ 32.** Grundað á egna meting og tilmæli frá náttúruverndarnevdini tekur Umhvørvisstovan avgerð.

*Partar og áhugað*

**§ 33.** Í avgerðarmálum skal náttúruverndarnevndin hoyra eigarar, brúkarar, leigarar, hagar, festarar ella onnur við rættindum, ið beinleiðis verða ávirkað av avgerðini.
*Stk. 2.* Somuleiðis skal náttúruverndarnevndin altíð meta um tørvin á og um neyðugt hoyra grannar, áhugafeløg, kommunur, almennar stovnar ella onnur, ið hava serligan ella almennan áhuga í málinum.
*Stk. 3.* Umhvørvisstovan tryggjar sær, at tey áhugaðu eru hoyrd, og kann áseta freist fyri hoyringini, ið eftir umstøðunum kann verða fráboðað alment.

*Víðkað hoyring*

**§ 34.** Náttúruverndarnevndin eins og Umhvørvisstovan kunnu skipa fyri almennum hoyringum.
*Stk. 2.* Hoyringarnar kunnu hava til endamáls at kunna og hoyra fólk í økinum um ætlaðar verndarætlanir ella týðandi verndarmál.
*Stk. 3.* Somuleiðis kunnu hoyringar hava til endamáls at hoyra partar og áhugað, ið eru nógv í tali ella lættari kunnu taka til orðanna í munnligari hoyring.

*Árinskanningar*

**§ 35.** Umhvørvisstovan kann í sambandi við friðingar, verndarætlanir, loyvi, treytir, avgerðir og fyrisiting annars eftir hesi lóg gera ella krevja árinskanningar.
*Stk. 2.* Árinskanningar skulu byggja á støðiskanningar, náttúruverndarætlanir og verandi friðingar. Árinskanningar skulu meta um tey atlit, sum nærri eru útgreinað í hesi lóg, í kunngerð ella samsvara náttúruverndarsiðvenju.
*Stk. 3.* Tá ið Umhvørvisstovan sjálv tekur stig til friðingar ella verkætlanir, rindar stovnurin útreiðslurnar. Somuleiðis kann stovnurin heilt ella partvíst fíggja árinskaningar, tá umsøkjari ella áhugaður fær órímiliga stórar útreiðslur av árinskanningum.

*Fráboðan*

**§ 36.** Náttúruverndarnevndin skal boða øllum pørtum beinleiðis frá málinum. Somuleiðis skulu hesi hava fráboðan um tilmælið hjá nevndini.
*Stk. 2.* Náttúruverndarnevndin eigur at lýsa ella kunna alment um mál, sum ætlast at hava áhuga hjá mongum, ella tá óvist er, hvørji tey áhugaðu eru, ella óvist er, hvar tey eru.
*Stk. 3.*Umhvørvisstovan boðar áhugaðum frá avgerðini. Somuleiðis

verður boðað øðrum frá avgerðini. Slík fráboðan kann fara fram ígjøgum almennar miðlar.
*Stk. 4.* Umhvørvisstovan kann eisini tinglýsa ella á annan hátt kunngera ella staðfesta avgerðir sínar.
*Stk. 5.* Umhvørvisstovan skipar savn við avgerðum, sum skal vera til taks á heimasíðu og øðrum miðlum og samskipast við náttúruverndarætlanina.

*Uttangarðs og innangarðs*

**§ 37.** Tá ætlanin hjá kommunu er, at uttangarðsjørð skal verða fevnd av býarskipan ella byggisamtykt, ella tá festari ella ognarfólk ætlar at leggja inn uttangarðsjørð, skal hetta góðkennast frammanundan av Umhvørvisstovuni.

## Kap. VII
## Umsitingarmál

*Náttúruvernd*

**§ 38.** Umhvørvisstovan skal fara undir miðvísa náttúrvernd, herundir:
1) at gera landsverndarætlan fyri allar Føroyar, herundir økisverndarætlanir,
2) at gera støðiskanningar á viðkomandi fakligu økjum, herundir um djór, plantur og annað lív, lívøki, búøki, jørðildi, jarðfrøði, landsløg, vinnu, frítíð og mentan,
3) at gera yvirlit og kort yvir allar tjóðgarðar, landsverndarætlanina og økisverndarætlanir, ítøkiligar friðingar og givin loyvi,
4) skjótast gjørligt at áseta markið millum innangarðs og uttangarðs á korti fyri alt landið,
5) skjótast gjørligt at áseta á korti fyri alt landið, hvørji øki eru fevnd av forboðnum eftir § 17, stk. 1.

*Stk. 2.* Umhvørvisstovan skal umsita tjóðgarðar, skipaðar gøtur og onnur náttúruverndartiltøk samskipað við aðrar myndugleikar.
*Stk. 3.* Náttúruverndarstovnarnir sambært kap. II hava í sínum virksemi óavmarkaðan rætt at ferðast í náttúruni og gera uppmátingar og skrásetingar v.m. Ognarfólk og tey, ið rættindi hava í ognini, eiga tó frammanundan at fáa fráboðan um, at farið verður á staðið.
*Stk. 4.* Umhvørvisstovan skal fyrireika sum týðandi mál keyp og endurgjald, tá verndartiltøk gerast tyngjandi fyri einstakar eigarar ella brúkarar, og tí gera neyvari avtalu neyðuga.
*Stk. 5.* Umhvørvisstovan skal fremja fyribyrgjandi arbeiði, herundir støðiskanningar og skrásetingar, í tøttum samstarvi við aðrar viðkomandi stovnar.
*Stk. 6.* Umhvørvisstovan kann lata aðrar myndugleikar ella stovnar gera neyðuga arbeiðið eftir nærri avtalu.

*Hagar og høv*

**§ 39.** Umhvørvisstovan skal í samráð við áhugafeløg, reiðarí, hagar, eigarar, brúkarar og avvarðandi myndugleikar kanna og vegleiða um árin á jørðildi, havbotn, plantur, djór, korallir, búøki, landslag og tílíkt av vanligum áhaldandi rakstri av djórahaldi, fiskiskapi, aling, samferðslu, ferðavinnu og tílíkum.
*Stk. 2.* Umhvørvisstovan kann samskipa og rinda fyri, at gjørdar ella framdar verða gøtur, uppmerkingar, vegleiðingar, planting, avbyrgingar og annað, ið skulu verja náttúruna í móti líðandi, óhepnari tilgongd.
*Stk. 3* Skilt verður millum lendi innangarðs og lendi uttangarðs. Við innangarðs er at skilja tað, ið sambært siðvenju ikki hevur verið skilt sum hagi, so sum veltur bøur, innlagdar traðir og byggilendi. Uttangarðs er at skilja sum hagi.
*Stk. 3.* Tá markið millum innangarðs og uttangarðs er ásett á korti fyri alt landið, sbr. § 38, stk 1, nr. 4, er hetta galdandi fram um ásetingarnar í hesi grein stk. 3.

## Kap. VIII
## Mannagongdir í kærumálum

*Kærufreistir*

**§ 40.** Vanliga kærufreistin í avgerðarmálum er 4 vikur eftir, at viðkomandi hava fingið boð um avgerðina.
*Stk. 2.* Í førum, har fleiri kunnu kæra, og ein teirra hevur kært innan freistina, kann náttúrukærunevndin loyva øðrum kærarum at koma fram við sínum kærum, um tað ikki leingir órímiliga nógv um viðgerðartíðina.
*Stk. 3.* Eisini í øðrum førum, har kæruáhugað ikki hava verið varug við málið ella ikki hava kært av orsøkum, sum nevndin metir vera góðar, kann kærunevndin lata kæru koma til viðgerðar eftir freistina í stk. 1.

*Skrivstova hjá náttúrukærunevndini*

**§ 41.** Landsstýrismanninum er heimilað eftir samráðingar at avráða, at Kærustovnur Føroya ella annar stovnur skal vera skrivstova hjá náttúrukærunevndini. Annars skipar landsstýrismaðurin skrivstovuna í samráð við nevndina.

*Málsviðgerð hjá náttúrukærunevndini*

**§ 42.** Náttúrukærunevndin skipar málsviðgerðina við skrivligari fyrireiking. Nevndin kann áleggja freistir í málsviðgerðini.
*Stk. 2.* Í málum, sum hava skund, ella har ognir, virði ella friðingaratlit kunnu fara fyri skeytið innan málslok, kann formaðurin áleggja fyribils forboð, friðing, støðg, atgerð ella annað.
*Stk. 3.* Náttúrukærunevndin endar málsviðgerðina við almennari hoyring, sum kann verða hildin í viðkomandi øki.
*Stk. 4.* Avgjørd kærumál verða almannakunngjørd eftir ásetingini í § 36, umframt á heimasíðu og í avgerðasavni, sum Umhvørvisstovan umsitur.

*Roynd*

**§ 43.** Avgerðir hjá náttúrukærunevndini kunnu ikki leggjast fyri landstýrismannin og eru endaligar innan fyrisitingina.

## Kap. IX
## Kunngerðarheimildir

*Kunngerðir*

**§ 44.** Landstýrismanninum er heimilað at áseta nærri reglur í kunngerðum:
1) um stovnar og ásetingarnar í kap. I, II, III og IV, hvussu hesir stovnar skulu skipast v.m.
2) um náttúruverndaratlit eftir kap. V, herundir nærri um forboð, skyldur, treytir, friðingarevni, friðað lívsøki, friðað djóra- og plantusløg og tílíkt,
3) um avgerðarmál eftir kap. VI, herundir um hoyringar, samsýningar, gjøld og árinskanningar,
4) um umsitingarmál eftir kap. VII, herundir um náttúruverndarætlanir,
5) um kærunevndarviðgerð eftir kap. VIII,
6) um lýsing av og áseting av treytum fyri A-, B- og D-friðingarøkjum, eftir kap. V.
7) um revsing við bót fyri brot á ásetingar í kunngerð sambært hesi lóg,
8) um skiftisreglur eftir kap. XI,
9) um avgjøld fyri umsiting av lógini.

*Stk. 2.* Umhvørvisstovan skal regluliga gera nærri vegleiðingar:
1) um náttúruverndarsiðvenju,
2) um, hvussu stovnurin skilur forboð, skyldur, treytir, friðingarøki og tílíkt,
3) um, hvussu stovnurin skilur reglurnar um loyvdan atburð í náttúruni og aðrar reglur, ið loyva atburði, ið annars kundi verið forboðin eftir hesi lóg.

## Kap. X
## Revsing, kravboð og gjald

*Revsing, kravboð og gjald*

**§ 45.** Brot á §§ 15, 16, 17, 18 og 22 í hesi lóg kunnu verða revsað við bót ella í grovum føri við hefti.

*Stk. 2.* Feløg v.m. (løgfrøðiligir persónar) koma undir revsing eftir reglunum í kap. 5 í revsilógini.

*Stk. 3.* Umhvørvisstovan kann boða viðkomandi frá, at brot sambært stk. 1 kunnu avgreiðast uttan rættarsókn, um so er, at tann, ið hevur framt brotið, játtar seg sekan í lógarbrotinum og váttar seg at vera til reiðar innan nærri ásetta freist, sum í undantaksføri kann verða longd eftir áheitan, at rinda landskassanum ávísa sekt, sum tilskilað er í fráboðanini.

*Stk. 4.* Reglurnar í rættargangslógini um innihaldið í ákæruritum í politimálum, skulu nýtast samsvarandi, tá ið fráboðanir verða kunngjørdar eftir stk. 3.

*Stk. 5.* Verður sektin rindað rættstundis ella eftir, at hon er samtykt, antin gjøgnum innheinting ella við at viðkomandi á annan hátt hevur liðið revsing fyri hana, fellur málið burtur.

*Stk. 6.* Bøtur sambært stk. 3 kunnu heintast inn við panting. Peningurin fyri hesar bøturnar fer í landskassan. Útreiðslur í sambandi við innheintan verða at rinda av tí, ið hevur framt brotið.

*Stk. 7.* Umhvørvisstovan kann heita á rættin um at tryggja fyribilsavgerðir, treytir, áleggingar, friðingar ella aðrar avgerðir hjá stovninum við dagbótum ella rættarkravboðum.

*Stk. 8.* Umhvørvisstovan kann áleggja gjald ella trygd fyri upprudding, árinskanningar og onnur tiltøk, sum av røttum annar enn Umhvørvisstovan eigur at svara fyri. Slík gjøld verða kravd inn á vanligan hátt.

## Kap. XI
## Skiftisreglur og gildi

*Myndugleikaskifti og fyrsta val*

**§ 46.** Landsstýrismaðurin ásetur nærri, nær myndugleikarnir higartil í friðingarmálum gevast, og hvussu teir lata Umhvørvisstovuni mál, skjalagoymslu og annað.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetur somuleiðis, nær náttúruverndarnevndin og náttúrukærunevndin verða settar fyrstu ferð.

*Stk. 3.* Mál, ið eru tikin til viðgerðar ella eru undir viðgerð, tá henda lóg kemur í gildi, verða viðgjørd og avgjørd eftir teim higartil galdandi reglunum.

*Friðingar og kunngerðir sambært eldri lóg*

**§ 47.** Friðingar, ið góðkendar eru í yvirfriðingarnevndini sambært løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 um náttúrufriðing, verða framvegis galdandi, til tær verða broyttar ella tiknar av sambært hesi lóg.

*Stk. 2.* Kunngerðir eftir lógini um náttúrufriðing, sbr. stk. 1, verða somuleiðis verandi í gildi, til tær verða broyttar ella settar úr gildi sambært hesi lóg.

*Gildi*

**§ 48.** Lógin kemur í gildi 1. januar 2012.

*Stk. 2.* Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 um náttúrufriðing.

*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann lata partar av hesi lóg koma í gildi fyri 1. januar 2012.

## Kap 1. ALMENNAR VIÐMERKINGAR

*Orsøk og endamál*
Lógaruppskotið hevur til endamáls at tryggja og skipa náttúruvernd í Føroyum. Nýggja lógin um náttúruvernd kemur í staðin fyri lóg um náttúrufriðing.

Tað er átrokandi neyðugt at fáa eina greiðari og munadyggari skipan av náttúruvernd í Føroyum.

Lógin fevnir um alt føroyska umveldið, tað er føroysku náttúruna út á 200 fjórðingar, og fevnir eisini um verndaráhugamál, sum ikki er knýtt at ávísum staði, eitt nú hótt djóra- og plantusløg.

Føroyar eru vælsignaðar við einari sera ríkari og fjølbroyttari náttúru, og fá lond í heiminum munnu vera so nært tengd at náttúruni í flestøllum lívslutum, sum vit. Ein væl vard nátúra við væl varðveittum lívfrøðiligum margfeldni, við heilsugóðari og reinari náttúru og við vøkrum landssløgum, er ein fyritreyt bæði fyri framhaldandi trivnaði hjá teimum, sum her búgva, men ikki minst eisini er hetta er eitt sera sterkt kort í mun til ferðavinnuna.

Men komið er at mørkum. Náttúran verður ikki vard av føgrum orðum eina.

**Nýggj lóg neyðug**
Gamla lógin um náttúrufriðing, er ikki nútíðarhóskandi og tryggjar ikki eina munadygga fyrisiting av nátúruvernd.

Longu í 2001 kom ein serfrøðingabólkur, ið varð settur av Føroya landsstýri, við hesi niðurstøðu um náttúrufriðingarlógina og Yvirfriðingarnevndina: "Náttúrufriðingarlógin nøktar als ikki tann tørv, sum er á náttúrufyrisiting í dag. [...] Nevndirnar fáa einki gjørt við ikki-dálkandi langtíðarvirkandi broytingar, sum t.d. landslagbroytingar, vatnorkubyrgingar og ikki sjónligar broytingar, sum t.d. oyðing av vøtnum."

**Høvuðsbroytingar í mun til galdandi lóg**
Høvuðsbroytingin við lógini um náttúruvernd í mun til galdandi lóg um náttúrufriðing, verður ein breiðari og virknari, meira proaktiv náttúrvernd. Har lógin um náttúrufriðing bygdi meira á atlit til vakurleika og sjáldsemi, byggir nýggja lógin á atlit til m.a. lívsløg og landsløg, og hevur til endamáls at varðveita og verja margfeldi í náttúruni, samstundist sum pláss er fyri menning av samfelagnum.

Farið verður í mest møguligan mun burtur frá skipanini við forboðum og loyvum, til eina skipan, har ein skáseting av allari náttúruni í landinum, verður grundarlag undir eini náttúrverndarætlan, sum skal tryggja at verndaratlit verða tikin í góðar tíð.

Eisini skipar nýggja lógin fyri, at myndugleikin kann krevja at gjørdar verða árinskanningar, tá tað verður mett neyðugt í sambandi við viðgerð av loyvum o.ø.

Meðan lógin um náttúrufriðing verður umsitin av leikfólki í Friðingarnevndum og Yvirfriðingarnevnd, leyst av politisku skipanini, verður nýggja lógin umsitin av kønum fakfólki í landfyrisitingini undir ábyrgd hjá landsstýrismanninum í

umhvørvismálum. Tó verður lokala tilknýtið tryggjað við økisumboðunum í náttúruverndarnevndini, ið ráðgevur landsmyndugleikanum og ummælir náttúruverndartiltøk

Verndaratlit verða eftir hesum skipaði meiri miðvíst. Skráseting skal gerast og vera grundarlag undir eini náttúruverndarætlan. Skrásetingin skal staðfesta, hvørji lívøki (biotopar), djóra- og plantusløg finnast, hvør jarðfrøði, hvørji landsløg, jørðildi osfr. eru at finna í Føroyum.

Í nógv ár hevur nýggj náttúruverdarlóg verið ávegis, og eitt uppskot varð í 2007 sent til hoyringar. Uppskotið, sum Tjóðveldi nú hevur lagt fram, tekur støði í hesum upprunauppskoti, men fleiri sentralar broytingar eru gjørdar í mun til upprunauppskotið.

Uppskotið er styrkt í mun til tær greinirnar, sum skulu fyribyrgja dálking og misrøkt av náttúruni, eins og greinar eru gjørdar sum greitt áseta, at ikki er loyvt ótálmað at flyta inn plantur og djór til landið. Eisini er ásett, at ferðafólk ikki uttan víðari kunnu taka við sær tyrnusteinar, blómur og annað virðismikið tilfar úr føroysku náttúruni.

Uppskotið leggur eisini upp til at hava *eina* náttúruverndarnevnd, heldur enn fleiri – eina nevnd fyri hvørja sýslu – soleiðis, sum upprunauppskotið segði. Í fyriliggjandi uppskoti er ætlanin, at náttúruverndarnevndin, umframt fastan serkunnleika frá Náttúrugripasavninum og Umhvørvisstovuni, er mannað við sonevndum økisumboðum, sum luttaka tá mál eru viðkomandi fyri tað økið, tey eru vald í nevndina at umboða. At hava eina, heldur enn fleiri náttúruverndarnevndir,tykist sum ein smidligari, fakliga sterkari og bíligari loysn.

**Styrkir í nýggju lógini**

Nýggja lógin byggir á atlit til lívøki (biotopar) og landsløg, lív og mentan. Ætlanin er at varðveita og verja margfaldni í náttúruni. Gamla náttúrufriðingarlógin bygdi meira á atlit til vakurleika og sjáldsemi; tað, ið vakurt og sjálvsamt var, skuldi verjast og varðveitast óbroytt.

Hetta skiftið frá tí 'estetiska' til tað meira fakliga, lív- og jarðfrøðilga, saman við skiftinum frá forboðum og loyvum í ítøkiligum førum til miðvísa vernd og varðveitslu í góðari tíð, fer at krevja økta játtan og fyrisiting, og ein upp- og/ella umraðfesting er tí neyðug. Fyrimunurin verður afturfyri, at náttúruverndin verður miðvísari, eins og atlit til rættartrygd og samfelagsáhugmál í hesum høpi verða løgd í tryggar karmar.

Á myndugleikaøkinum leggur nýggja lógin upp til eina meira fakliga køna skipan, ið eisini kemur at standa politiskt til svars. Gamla skipanin við friðingar- og yvirfriðingarnevndum hevur verið fyri atfinningum, fyrst av øllum tí henda varð skipað leyst av vanliga fyrisitingarmyndugleikanum. Eisini er tað óheppið, at dómstólarnir sambært galdandi lóg ikki til fulnar hava kunnað tikið støðu til friðingarmál.

Eftir nýggju lóginini før politiski myndugleikin til uppgávu at leggja fram eina almenna frágreiðing til umrøðu á Løgtingi fjórða hvørt ár, og við hesum tryggja sum mest av fólkaræðiligari ávirkan. Í týðandi (prinsippiellum og kostnaðarmiklum) málum fær landsstýrismaðurin heimild at taka støðu. Lokalu økini verða umboðaði í

náttúruverndarnevndini, og rættartrygdin verður styrkt við eini kærunevndarskipan og við, at dómstólarnir, sum sjálvsagt er, ikki verða forðaðir í at eftirmeta náttúruverndarmál.

**Lívfrøðiligt margfeldni og vilji Løgtingsins**
Stórur partur at teirri vitan, vit í dag hava um føroysku náttúruna og lívfrøðiligt margfeldni, er savnað í bókini "Føroya Náttúra", sum Føroya Skúlabókagrunnur gav út í 2006.

Á summum økjum eru vit í Føroyum komin væl áleiðis at skráseta náttúrumargfeldni, meðan á øðrum er nógv eftir enn. Fleiri ymsar verkætlanir í Føroyum hava skrásett lívøki og landsløg bæði á landi, á sjógvi og í undirgrund. Slík skráseting ger, at til ber gjøllari og neyvari at siga, hvussu vit kunnu verja og varðveita ymisk sløg av djóra- og plantulívi, ymisk sløg av landslagi, jarðfrøðifyribrigdum og lívsumstøðum.

Náttúrverndarætlanin krevur tó ikki í sjálvum sær eina fullfíggjaða skráseting yvir øll sløg av landslagi og øll djóra- og plantusløg. Til ber at arbeiða parallelt við skrásetingini og náttúruverndarætlanini. Mest týðandi er at staðfesta lívøkini (biotoparnar) og harvið fortreytina fyri eini røð av ymsum djóra- og plantusløgum.

Árið 2010 var lívfrøðiligt margfeldisár. Longu í 1993 samtykti Løgtingið ST-sáttmálan um lívføðiligt margfeldni, sum er sera víðfevndur. Ein av mongu ásetingunum í sáttmálanum er 2010-málið um at støðga afturgongdini av lívfrøðiligum margfeldni.

Í 2004 settu altjóða náttúruverndarfelagsskapurin IUCN og ES-nevndin "Countdown 2010"-tiltakið í verk fyri at stuðla undir arbeiðið at varðveita lívfrøðiliga margfeldni. Lond kring allan heim eru við í "Countdown 2010". Føroyar hava ikki skrivað undir hesa yvirlýsing, men Løgtingið hevur kortini sera greitt staðfest, at lívfrøðiliga margfeldið í Føroyum skal tryggast. Tað gjørdi Løgtingið enn einaferð, tá tað við stórum meiriluta í 2006 samtykti, at: "Løgtingið heitir á landsstýrið um at taka stig til at fylgja sáttmálanum um lívfrøðiligt margfeldni og lýsa margfelda lívið í føroysku náttúruni." Viljin til at raðfesta hetta, endurtók meirlutin í Rættarnevndini í áliti til Løgtingsmál 130/2009, har meirlutin skrivar, hóast hetta tíverri ikki fekk pláss í fíggjarligu raðfestingunum.

Í 2004 skrivar Innlendismáláráðið saman við øðrum Norðurlondum "Miljøhandlingsplan 2005-2008". Har stendur: "Det nordiske samarbejde skal indrettes på en sådan måde, at den negative udvikling, når det gælder tab af arter og bestande inklusive deres levesteder, stoppes med det formål, at tabet af biologisk mangfoldighed standses senest i 2010" og "Arbejdet med at standse tabet af biologisk mangfoldighed senest i år 2010 vil have høj prioritet".

Náttúrugrípasavnið hevur áður havt játtan til at skráseta og kortleggja øll plantu- og djórasløg í náttúruni í ein dátugrunn, eins og grein 7 í sáttmálanum um lívfrøðiligt margfeldni ásetir. Umframt at savnið hevur gjørt reyðlistar, sum áseta, hvørji plantu og fulglasløg í Føroyum eru hótt. Ein long røð av plantu- og fuglasløgum eru komin á reyðlistan.

Játtanin at halda fram við skrásetingini varð í 2006 steðgað m.a. við grundgevingini,

at ***nú fór ein náttúruverndarlóg, sum skipaði alt náttúruøkið, at koma***.

**Tjóðgarðar og onnur friðað øki**
Nýggja skipanin ber í sær, at vit í góðari tíð meta um byggi- og býarskipan, so hon sum minst skaðar náttúruna. Ætlanin er sostatt, at bæði framtíðarmenningin og náttúruvernd skulu styrkjast, tí hesi atlit ikki í knappari vending skulu setast upp ímóti hvørjum øðrum. Náttúruverndarætlanin fyri landið alt, eins og økisverndarætlanirnar fara ætlandi at vegleiða kommunur, stovnar og privat um, hvørji atlit skulu takast til náttúrvernd í góðari tíð, áðrenn útbyggingin skal fremjast.

Tann miðvísa umhvørvisumsitingin fær eisini uppgávuna fyri at skapa veruligar tjóðgarðar í Føroyum. Vit kunnu hugsa okkum, at einstakar smærri oyggjar, markatalsbygdir, størri dalar ella onnur størri landsløg verða skipaði sum tjóðgarðar. Tjóðgarður ber ikki í sær, at alt fólka- og djóralív skal beinast burtur. Tvørturímóti er ikki óvanligt aðrastaðni, at tjóðgarðar tryggja, at siðbundna lívið og djórahaldið heldur fram. Hetta er spurningur um endamál og skipan av einstøku tjóðgørðunum. Summir tjóðgarðar kunnu hava til endamáls at varðveita bø og haga við seyði, neyti, gás og øðrum siðbundnum djórahaldi og tryggja, at ikki velting, bygging ella annað órógvar hesa mentunarnáttúru. Aðrir tjóðgarðar kunnu vera ætlaðir at endurskapa vøkstur, ið hevur verið vanligari í Føroyum fyrr.

Dømi um komandi tjóðgarð er Koltur, sum arbeiðsbólkurin, ið hevur arbeitt við at gera eina varðveitingarskipan fyri bæði mentanar- og náttúruvirði í oynni, hevur gjørt uppskot um.

Endamálið við hesum er at varðveita og vísa fram undir skipaðum umstøðum mentanarvirðini í oynni, sum gamla býlingin og teigalendið, umframt at stika seyðin av í norðara parti av oynni, soleiðis at ein partur av oynni verður órørd náttúra. Somuleiðis kundi ein ímyndað sær, at t.d. føroysk húsdjór vórðu varðveitt í oynni.

**Leingi er bíðað**
Tað var táverandi Olju- og umhvørvismálaráðið, sum upprunaliga fór undir at smíða uppskot til nýggja náttúruverndarlóg, og helt arbeiðið seinni fram í Innlendismálaráðnum. Í 2007 varð eitt uppskot sent til hoyringar. Men, hóast eitt útkast til lóggávu sostatt hevur ligið klárt í áravís, er tað ongantíð komið á tingborð.

Nú triðja tingsetan hjá sitandi samgongu er farin at halla, er trupult at finna haldgóðar grundgevingar fyri, at útseta hetta longur. Løgtingið sleppur tí nú fyri fyrstu ferð at viðgera og siga sína hugsan um uppskotið til náttúruverndarlóg.

**Fígging**
Um náttúruverndarlógin verður samtykt nú, men við gildi frá 1. januar 2012 hevur landsstýrið rúmar stundir at fyrireika umsiting av lóggávuni og at fáa hetta raðfest inn í fíggjarlógina fyri 2011. Arbeiðið at skráseta lívfrøðiliga margfeldni eigur tó at verða uppafturtikið beinanvegin, og summarhálvan er rætta árstíðin til hetta arbeiðið. Tí átti ein umraðfesting av fíggjarlógini at verið gjørd, so nakrar krónur verða tøkar til hetta arbeiðið beinanvegin.

## Kap. 2. AVLEIÐINGAR AV UPPSKOTINUM

### Fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar

Galdandi náttúrufriðingarlóg hevur seinastu árini kostað landskassanum í mesta lagi góðar kr. 300.000 um árið. Henda upphædd er farin til nevndarsamsýningar hjá limum í Yvirfriðingarnevndini og teimum sjey sýslunevndunum.

Náttúruverndarlógin fer at hava nakað størri útreiðslur við sær. Talan verður enn um nevndarsamsýning til økislimirnari í náttúruverndarnevndini, men harumframt verður sett á stovn faklig køn umsiting innan náttúruvernd og fyrisiting, sum m.a. skal:

- luttaka í fundum hjá náttúrufriðingarnevndini
- geva loyvi til frávik
- ummæla nýggjar og víðkan av galdandi býarskipanum og byggisamtyktum
- taka støðu til ávísar friðingar sambært § 18-20 og § 25-27
- áleggja boð og góðkenna inntriv í náttúruna sambært § 22 og § 23
- gera árinskanningar sambært § 35
- gera landsverndarætlan, støðiskanningar, yvirlit og kort sambært § 38
- gera tilmæli til landsstýrismannin um umfevnandi friðingar
- fyrireika frágreiðing um Náttúruverndarmál til Løgtingið

Harumframt skal sama fyrisiting í samstarvi við Innlendismálaráðið fylla út karmarnar í lógini við at smíða kunngerðir og vegleiðingar sambært § 44.

Tað er torført at meta um, hvussu nógv starvsfólk skulu setast til tess, at lógin kann verða umsitin nøktandi, men havandi í huga, at tað snýr seg um eitt heilt nýtt umsitingarøki, har ein stórur partur av orkuni í byrjanini ivaleyst fer til eina røð av skrásetingum og øðrum fyrireikingum, ið skulu á pláss, áðrenn uppgávurnar og arbeiðstrýstið nær eina nøkulunda fasta legu, verður mett, at í fyrsta lagi eiga minst 2 akademisk størv at verða upp- ella umraðfest til hesar uppgávurnar. Sum víst aðrastaðni í viðmerkingunum hevur Løgtingið longu fleiri ferðir áður samtykt at játta tvey størv til skráseting av lívfrøðiligum margfeldni.

Hvussu nógv mál, náttúruverndarnevndirnar og náttúruverndarkærunevndin koma at viðgera, er ilt at meta um. Ein leiðbeining kann tó vera tøl fyri mál, sum Yvirfriðingarnevndin fær til viðgerðar, og eru tey millum 45 og 80 árliga, sambært hagtølum frá Hagstovuni.

Av øðrum beinleiðis útreiðslum, ið standast av nýggju lógini, eru útreiðslur hjá Umhvørvisstovninum av at gera gøtur, uppmerkingar, vegleiðingar o.o. kunnandi og fyribyrgjandi tiltøk sambært § 39. Hetta kann tó verða fíggjað í samstarvi við kommunur og eisini í ávísum førum privatum, eitt nú ferðavinnufyritøkum. At gera gøtur o.t. eigur at verða mett, sum arbeiðsskapandi átøk, sum stórur tørvur er á í løtuni, nú arbeiðsloysið er sera stórt.

Eins og við galdandi náttúrufriðingarlóg hava kommunur ikki umsitingarligan leiklut sambært lógini. Tó verður nakað av avleiðingum fyri kommunur, tí nýggja lógin krevur, at nýggjar býarskipanir og byggisamtyktir og víðkanir av galdandi

býarskipanum og byggisamtyktum skulu ummælas av Umhvørvisstovuni, eins og Umhvørvisstovan kann áleggja kommunum og øðrum myndugleikum at gera árinskanningar.

Størri umskifti í náttúruni sum grótbrot, byrgingar, tunnilsgerð, havnagerð og annað, sum ikki longu er loyvt sambært góðkendari býarskipan, skal góðkennast av Umhvørvisstovuni. Hetta hevur avleiðingar fyri bæði land og kommunur.

## Avleiðingar fyri vinnuna

Fyri landbúnaðarvinnuna fer lógin at hava við sær nakað av avleiðingum, tí ásett er í lógini at nývelting og uppskering av lendi uttangarðs krevur góðkenning frá Umhvørvisstovuni.

Fyri ferðavinnuna kann hugsast, at lógin fær nakrar óbeinleiðis avleiðingar, tí ætlanin er, at Umhvørvisstovan skal skipa fyri gøtum, uppmerking og vegleiðingum í náttúruni, soleiðis at ferðing í náttúruni fer fram undir skipaðum umstøðum.

Eisini er sannlíkt, at ásetingarnar í lógini um friðing av støðum, djórum og vøkstir, umframt møguleikin at gera tjóðgarðar, sum vit kenna frá okkara grannalondum, fer at styrkja Føroyar sum ferðamannaland. Og hetta er eisini stórt pluss fyri landbúnaðarvinnuna, sum í alsamt størri mun samantvinnast við ferðavinnuna.

Tað verður oftani víst á, at Føroyar hava áhuga ímillum ferðafólk, ið vilja hava náttúruupplivingar. Slík ferðafólk hava vanliga eisini virðing fyri náttúruni og ynskja ikki at skaða hana. Tískil leita slík ferðafólk óivað eftir upplýsingum um føroysku náttúruna, hvussu hon er fyri, og hvar tað ber til at uppliva hana, og undir hvørjum treytum hetta kann fara fram .

Tí verður mett, at eitt miðvíst arbeiðið fyri at verja og røkja náttúruna, umframt miðvís kunning um hesi viðurskifti, kann gerast ein týðandi lutur í marknaðarføringini av Føroyum sum ferðavinnuland. Í hesum sambandi er vert at vísa á, at væl skipaða og neyva lóggávan, sum varð áløgd alivinnuni, í dag verður nýtt beinleiðis í marknaðarføring av føroyskum laksi.

Mett verður ikki, at lógin hevur beinleiðis avleiðingar fyri aðra vinnu.

## Avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar

Sáttmálin um lívfrøðiligt margfeldi, sum Løgtingið tók undir við í 1993, áleggur m.a. sáttmálapørtum at skráseta, kortleggja og skipa vernd av náttúruni.

Einasta roynd, sum er gjørd í Føroyum at fylgja hesum ásetingum, er arbeiðið, sum m.a. Náttúrugripasavnið hevur framt við árligari verkætlanarfígging frá Oljumálaráðnum/Innlendismaálráðnum at kortleggja føroysku náttúruna.

Hetta arbeiðið er tó steðgað vegna vantandi fígging.

Verður lógin sett í gildi, og verður nøktandi fígging fingin til vega, so er ein av høvuðsuppgávunum, og framtíðar støði undir náttúrufyrisitingina, at taka upp táttin at skráseta og kortleggja náttúruna.

Lógin kann eisini fáa stóran týdning fyri arbeiðið at vinna Føroyum altjóða RAMSAR-viðurkenning fyri ávís øki í landinum, til verju av fuglabjørgum, lendi o.ø., sum hevur stóran týdning fyri ávísar fuglastovnar, serliga lomviga, lunda, ritu, drunnhvíta og skúgv.

## Kap. 3. SERLIGAR VIÐMERKINGAR

### Kap. I.

Vanligt er í Norðurlondum at taka samanum endamálið við lógini og greiða frá, hvussu vítt hon fevnir. Náttúruverndarlógir eru oftast lógir merktar av 'standardum' heldur enn 'reglum'. Hetta merkir, at lógin nýtir liðilig hugtøk, ið krevja, at myndugleikarnir meta um, grundað á fyrilit samsvarandi lógini. Lógarstandardir og heimildir at meta merkja ikki, at myndugleikarnir hava frítt fyri at gera sín egna politikk ella sveiggja higar og hagar í metingunum. Heldur eiga stovnarnir at vera sera nágreiniligir í at útgreina, hvussu komið verður fram til úrslit, og hvussu rættindi borgaranna verða vird.

Fyrsti kapittul tekur samanum hesar standardir og greiðir frá skipan og fevnd lógarinnar.

**§ 1 – endamál**

Ásetingin tekur samanum lógina og teimum ymsu atlitum, ið lógin nærri skipar. Fleiri ymisk atlit skulu sameinast í lógini. Náttúran skal verjast, men samstundis skal rúm vera fyri samfelagsligari menning. Lógin skal í verki fremjast ígjøgnum áhaldandi fólkaræðisligt orðaskifti á tingi eins og um alt landið, fakligar tilráðingar og virðing fyri rættartrygd.

Við náttúru verður meint landsløg, jørðildi, lívøki, búøki, havbotnur, sjógvur, vøtn, tjarnir, áir, djór, plantur og annað livandi.

**§ 2 – økið**

Føroyska umveldið fevnir nógv víðari enn avmarkaða landøkið. Skal náttúran verjast og skipast fyri eftirtíðina, er neyðugt at taka alt umveldið upp í fevnd lógarinnnar. Hetta merkir ikki, at hvør grynna nú verður friðað, men at tað er líka nógv vert at verja landsløg ella djórasløg í havinum, sum á landi.

Tá vinnuvirksemi á landi ávirkar náttúruna, eru hesi árin ofta sera sjónlig. Men eisini virksemi á havinum kann hava stór árin á náttúruna, og verndaratlit eru eisini at taka á havbotni og í sjónum. Dømi um hetta eru koraløkini á botni í føroyskum umveldi. Eisini skal lógin vera við til at tryggja árinskanningar og náttúruvernd í sambandi við oljuleiting og –úrvinning.

Við umveldið verður roknað alt føroyskt øki út á 200 fjórðingar.

**§ 3 – allýsing**
Náttúran er samansett av bæði tí livna (biotiska) og ólivna (abiotiska).
Náttúra fevnir um lívverur, teirra (uppruna) lívøki, og vistfrøðiskipanina, tey eru partur av.

Í sambandi við orð og hugtøk viðvíkjandi náttúruni, verður víst til orðalistan s. 230 í bókini, "Føroya Náttúra, lívfrøðiligt margfeldni", sum Føroya Skúlabókagrunnur gav út í 2006.

**Kap. II**
Annar kapittul lýsir stovnarnar, ið skulu umsita náttúruverndina. Skipanin higartil hevur verið, at nærum alt vald hevur ligið hjá eini yvirfriðingarnevnd, sum hevur fingið øll mál til avgerðar. Henda skipan hevur ikki borið í sær nøktandi kærumøguleika.

Skipanin verður tó framvegis hon, at ein myndugleiki fyri alt landið hevur síðsta orðið í fyrisitingarligum málum, eftir tilmæli frá nevnd við lokalum umboðum.

Landsmyndugleikin verður nú ein veruligur fyrisitingarstovnur, heldur enn ein nevnd við persónligum limum.

Økislimirnir verða valdir sjey í tali, eitt fyri hvørt av økjunum Suðuroy, Sandoy, Vágar, Norðstreymoy, Suðurstreymoy, Eysturoy og Norðuroyggjar. Økislimirnir eru skiftandi limir, skilt á tann hátt at teir eru við í viðgerðini av málum, sum snúgva seg um náttúruverndarmál í økinum, teir umboða.

**§ 4 og §5 – náttúruverndarnevndin**
Í henni verða umframt formaðurin og fast umboð frá Umhvørvisstovuni og Náttúrugripasavninum, økislimir, sum verða við til viðgerð av málum, alt eftir hvat mál, tað snýr seg um. Er til dømis talan um náttúruverndarmál í Sandoynni, er umboðið fyri Sandoynna við til viðgerð av málinum. Er talan um mál, sum er viðkomandi fyri til dømis bæði Suðurstreymoy og Norðstreymoy, verða bæði hesi økisumboðini við til málviðgerðina.

Formaðurn kann gera av, at fleiri enn ein og møguliga allir útnevndu økislimirnir lutta í viðgerðini av ávísum máli. Í hvørjum einstøkum førum ger formaðurin av hvussu nógvar økislimir, tað er viðkomandi at hava við til viðgerðina og verður hetta gjørt eftir serstøkum reglum, sum landsstýrismaðurin ger.

Kommunur, feløg og einstaklingar kunnu skjóta upp fyri landsstýrismanninum, uppskot til persónar at vera økislimir. Landsstýrismaðurin velur økislimirnar millum fólk, sum hava hollan kunnleika til náttúruna og náttúruverndarviðurskifti í tí økinum, teir skulu umboða.

**§ 6 – Umhvørvisstovan**
Greinin ásetur, at tað er Umhvørvisstovan, ið sum høvuðsregla fer at umsita øll náttúruverndarviðurskiftini, ásett í hesi lóg. Verða gjørd undantøk, skal gjølla grundgevast fyri hesum við ávísing til reglur og lógaráseting.

**§ 7 - Náttúrukærunevndin**
Kærunevndin verður skipað sum aðrar kærunevndir. Vald fyri áramál, samansett av limum úr ymsum fakbólkum við einum lógkønum formanni. Ætlandi verður Føroya kærustovnur skrivstova hjá náttúrukærunevndini. Henda kærunevnd kann heilt ella lutvíst vera sama kærunevndin, ið sambært aðrari lóg virkar á øðrum økjum, eitt nú innan byggi- og býarskipanarøkið. Náttúrukærunevndin kann eisini samskipast við eitt nú Vinnukærunevndina, verður tað mett praktiskt.

**Kap. III**
Triði kapittul umrøður stórmál - frágreiðing fyri Løgtinginum og umfevnandi náttúrufriðingar. Eftir uppskotinum fevnir hugtakið um umfevnandi frágreiðingar og størri samskipaðar friðingar- ella verndarætlanir. Lóg av hesum slagnum, merkt av víðum endamálum og lógarstandardum, kann flyta ov nógv vald frá Løgtingi til landsstýri. Triði kapittul skal byrgja upp fyri hesum. Landsstýrismaðurin skal kunna Løgtingi um støðuna í størri avgerðarmálum sambært lógini, í kunngerðum eftir lógini og í øðrum viðurskiftum á økinum. Landsstýrismaðurin skal eisini leggja fyri Løgtingið sum lógaruppskot ætlanir at fremja størri friðingar, eitt nú tá øki verða sett av sum tjóðgarður.

**§ 8 – frágreiðing um náttúruvernd**
(1) Ætlanin er, at hvørt valskeið skal landsstýrismaðurin leggja frágreðing fyri tingið til aðalorðaskriftis.
(2) Frágreiðingin skal taka samanum:
- tær umfatandi náttúrufriðingar, ið landsstýrismaðurin og aðalráðið hava stílað fyri,
- tey týðandi mál, har aðalráðið hevur valt at taka virknan lut,
- avgerðarmál, sum Umhvørvisstovan hevur avgreitt, men sum kunnu lýsast í høvuðsheitum í frágreiðingini, serliga við atliti at, hvørji nærri atlit verða nýtt, og hvussu tey verða vektað,
- kunngerðir, ið landsstýrismaðurin hevur sett í gildi ella broytt,
- hvussu kærumál hava rætta avgerðir og greitt lógarfatan,
- hvørji tiltøk annars eru ella verða neyðug at verja náttúruna,
- hvørji djóra- og plantusløg verða metta serliga hótt ogsfre.

**§ 9 – umfevnandi náttúrufriðingar, atlit**
Greinin ásetur, tey atlit, sum landsstýrismaðurin skal taka við í fyrireikingar sínar av umfevnandi náttúrufriðingum.

**§ 10 – umfevnandi náttúrufriðingar, mannagongd**
Greinin lýsir, hvussu landsstýrismaðurin skal fara fram, herundir tryggja sær bæði fakligan og lokalan fakkunnleika í fyrireikingunum.

Síðani skal landsstýrismaðurin leggja eitt greitt skipað lógaruppskot fyri tingið. Sama mannagongd er galdandi, tá um tjóðgarðar ræður.

Hvørji mál eru nóg stór at kallast umfevnandi friðingarmál, er ein politisk meting. Løgtingið hevur síðsta orðið at siga hesum viðvíkjandi og kann í sambandi við viðgerðina av frágreiðingini sambært § 8 lata landstýrismannin vita, hvør tingsins vilji er. Løgtingið kann eisini gera samtykt hesum viðvíkjandi.

**Kap. IV**
Fjórði kapittul lýsir tey vanligu náttúruverndarmálini:

- avgerðarmál,
- umsitingarmál,
- týðandi mál, og
- kærumál

**§ 11 – avgerðarmál**
Tey flestu mál eftir hesi lóg verða avgerðarmál, har Umhvørvisstovan tekur avgerð eftir reglum um einstøk mál. Reglurnar eru partvíst ásetingar í hesi lóg, partvíst ásetingar í kunngerð, og partvíst venja innan náttúruverndarmál, har stovnurin hevur tikið støðu til ítøkilig fyrilit, har kærunevndin ella dómstólar hava rætta lógini, og annars har eldri mál kunnu vegleiða . Mannagongdirnar eru nærri skipaðar í sætta kapitli.

**§ 12 – umsitingarmál**
Umhvørvisstovan skal taka sær av málum, har ongin fyrisitingarlig avgerð verður tikin, men heldur talan er um 'faktiska fyrisiting', tvs. at landið brúkar miðlar til vørur, tænastur og íløgur. Eftir uppskotinum verður partur av náttúruverndini millum mangt annað at seta upp skelti, gera gøtur, tryggja lendi, ala plantur, greiða frá, og annars skipa fyri vernd av og upplýsing um náttúruna. Hvat ítøkiliga verður gjørt, velst um játtan og politiskar ætlanir.

**§ 13 – týðandi mál**
Landsstýrismaðurin og aðalráðið fáa eftir hesum møguleika at taka ræði á málum, sum landsstýrismaðurin metir hava stóran týdning. Á henda hátt er tað tann myndugleikin, sum stendur til svars mótvegis tinginum, sum altíð hevur vald at taka støðu. At landsstýrismaðurin tekur støðu, forðar tó ikki fyri vanligari kæruviðgerð. Landsstýrismaðurin skal grundgeva sera gjølla fyri hví hann metir yvirtøku av málum verða neyðugt. Og verður hetta at gera bert í heilt serligum førum.

Landsstýrismaðurin kann einans taka ræði á einum máli, eru tungtvigandi orsøkir til tess – til dømis um ein avgerð kann væntast at kosa landskassanum sera nógvan pening, at avgerðin kann fáa víðfevndar avleiðingar fyri vinnuligt virksemi e.l.
Greinin er á ongan hátt ætlað sum ein heimild hjá landsstýrismanninum at leggja seg út í vanliga málsviðgerð hjá Umhvørvisstovuni. Vanligar gegnisreglur eru sjálvandi galdandi í hesum sambandi.

**§ 14 – kærumál**
Eftir uppskotinum verður møguligt at kæra øll avgerðarmál. Kærunevndin ger sjálv av, um eitt mál av røttum er avgerðarmál.

Til ber eisini at venda sær til Umhvørvisstovuna viðvíkjandi umstingarmálum, og síðani heita á aðalráðið um at taka tey upp, men tey eru ikki kærumál.

**Kap. V**
Fimti kapittul skal nærri lýsa atlit í náttúrverndarmálum.

Kapittulin er skipaður í fýra partar:

- forboð og skyldur,
- friðingar,
- krøv, loyvi, treytir og tílíkt, og
- verndar- og friðingaratlit

Sum nevnt í endamálsorðingini eru fyrilit fyri altjóða skyldum Føroya lóglig atlit eftir hesi lóg. Millumlanda sáttmálar eiga tí at verða tiknir við í tulking og meting eftir hesum kapitli, tó við fyriliti fyri lógarinnar egnu ásetingum, eins og øðrum lógum, serliga fyrisitingarligum meginreglum.

**§ 15 og 16 – forboð**
Forboð verða eins og í gomlu lógini sett móti ávísum sløgum av dálkandi og skemmandi atferð. Revsireglur hesum viðvíkjandi eru í kap. X. Ítøkiligar áleggingar eru heimilaðar í § 21 (parti B í Kap. V).

Forboðini galda atferð, sum skemmur ella dálkar náttúruna. Í tætt bygdum øki, innandura, á vegum osfr. kunnu í staðin reglur í politiviðtøkum, reglugerðum hjá stovnum, ferðslulóg ella aðrar reglur vera galdandi.

Forboðini eru rættað móti atburði, sum ikki er partur av vanligum virksemi í náttúruni.

At sløða lutir, kann vera at lata bilvrak, plastposar, og annað órudd liggja uttan nyttu ella umhugsni í náttúruni.

At fara illa um, kann vera at ganga órstorsliga í viðbreknum øki, so lendi, plantur ella djór fáa ampa. Hetta kann vera niðurbíting ella yvirskipan og fyrilitarleis taðing. Talan kann eisini vera um at skala veitir, ágrøði, hegn og annan útbúnað ella at gera eigarum, brúkarum ella øðrum, ið njóta náttúruna, ónáðir.

At lata útbúnað forfalla, kann vera at lata hegn, portur, rættir, úthús ella tílíkt falla í slíka órøkt, at tað missir sína nyttu og verður til ampa ella ógvusliga skemmir náttúruna í annans eygum. Eisini fevnir forboðið um at brúkt aliútgerð liggur og sløðist í náttúruni.

At taka úr náttúruni kann vera øll tøka, ið brýtur frá vanligum atburði ella er ímóti áhugamálum ella boðum hjá lógligum eigarum, brúkarum ella friðingum og vernd sambært hesi lóg. Eisini er hetta galdandi fyri ferðafólk, sum ikki uttan loyvi kunnu taka við sær steinar, plantur og djór av landinum.

Greinin fevnir eisini um innflutning av djóra og plantusløgum. Innsløðing er ein stór hóttan móti náttúruni, og tí er neyðugt at áseta lógarheimild til fyrisiting av innflutningi av djóra- og plantusløgum, við tí endamáli at verja náttúruna. Nærri reglur fyri hesum verða ásettar í kunngerð.

At grava, byggja, osfr., fevnir um øll hugsandi inntriv.

Bannið móti koyring við akførum av einihvørjum slag uttanfyri vanligan kommunu- og landsveg, ella øðrum eftir siðvenju nýttum vegum í sambandi við røkt av landbúnaði, ella tekniskum útbúnaði uttangarðs, er ætlað sum vernd móti skaða á

jørðildi og gróður orsakað av óneyðugari ferðing við akførum í haga. Her verður eitt nú hugsað um motorcross og ATV-arar (all terrain vehicle), sum kunnu gera sera stóran skaða á økið, har koyrt verður. Land og kommunur kunnu seta av serstøk øki til hesa koyring, so skaðin verður so avmarkaður, sum til ber.

Undantøkini, ið myndugleikin kann geva loyvi til eftir (2) og (3), eru ætlaði nærri at lýsa, hvat vanligt brúk er. Hesi undantøk verða nærri at skilja á staðnum í samsvar við vernd og friðing eftir hesi lóg.

**§ 17 – forboð móti bygging**
Eftir hesi áseting verða nøkur øki, sum ikki eru loyvd at byggja uttan nærri loyvi ella skráseting. Ásetingin er ætlað at verða samskipað við býarskipan, soleiðis at áðrenn býarskipan verður góðkend í hesum økjum, verður ætanin mett eftir hesi lóg.

**§ 18 – størri umskifti í náttúruni**
Eftir hesi áseting skulu størri umskifti fráboðast og góðkennast. Umhvørvisstovan kann seta serligar treytir við atliti til náttúruvernd.
Eftir ætlan verður skrásetingin so líðandi komin somikið væl áleiðis, at tað fer at bera til hjá borgarum og myndugleikum at síggja frammanundan, hvørji viðbrekin landsløg ella lívsløg eru í einum øki. Greitt er, at býarskipanir í sjálvur sær loyva størri umskifti, og tí mugu slík inntriv ella slík regulering eisini góðkennast eftir náttúruverndarlógini. Ov seint kann vera – og í øllum førum tyngjandi fyri borgaran – at skula góðkenna hvørja einstaka ætlan, ið longu er loyvd eftir býarskipan ella byggiætlan.

**§ 19 – ítøkiligar friðingar**
Hóast lógin byggir á, at sum mest av friðing skal vera gjørd proaktivt, í góðari tíð og grundað á so umfatandi skráseting sum til ber, so verður tó neyðugt at friða ítøkiliga viðhvørt, hóast hetta verður til ampa fyri einstaka vinnu- ella byggiætlan ella annað virksemi.

**§ 20 – samskipandi friðingar**
Í mongum førum eru friðingar farnar fram eftir gomlu lógini um friðing. Hesar eins og nýggjar friðignar eiga at samskipast, soleiðis at tær tilsamans megna at verja landsløg og lívøki. Í summum førum kann eldri friðing møguliga gerast minni víðfevnd, í øðrum førum broyta skap og fevnd. Undir øllum umstøðum er tað ikki nøktandi, at friðingar bara verða gjørdar ad hoc, tá ein ætlan er komin í eygað.

**§ 21 – friðingarsløg**
Ásetingin býtir upp friðingar í ymisk sløg. Hóast greitt mark ongantíð kann vera teirra millum, so er ætlanin, at skipanin skal skapa greiðari fatan av lógfylgjunum av eini friðing.

Nágreinilig lýsing av A-, B og D-friðingum verður ásett í kunngerð.

**§ 22 – áleggingar**
Við hesi áseting eru greiðar heimildir fyri krøvum, boðum og øðrum áleggingum, sum neyðug eru at fyribyrgja brotum á lógarinnar ásetingar. Kærunevndin eins og dómstólarnir fara helst at ansa sera væl eftir, at henda áseting ikki verður misnýtt ella misfatað.

**§ 23 – at loyva**
Henda áseting gevur møguleika eftir skipaðari og væl lýstari mannagongd at geva loyvi, har friðing ella vernd annars forða tí.

**§ 24 – at seta treytir**
Greið heimild verður við hesum fyri treytum, bæði tá verkætlanir verða framdar, og tá inntriv føra við sær áhaldandi broytingar.
Verða til dømis nýggj øki sett av til virksemi, kann Umhvørisstovan áleggja landi ella kommunu at tryggja, at neyðugar árinskanningar verða gjørdar. Land ella kommunurnar mugu sjálvar fíggja hesar árinskanningar, ella krevja, at tey, sum skulu nýta økið, gjalda fyri hetta. Her kann vera talan um árinskanningar í sambandi við nýtt virksemi til dømis í sambandi við bygging, aling, oljuleiting, tunnilsgerð, vegagerð við meira.

**§ 25 – at seta myndugleikum treytir**
Nátturverndarumsitingin fær við hesum eisini heimild at seta øðrum myndugleikum treytir til tess at tryggja náttúruvernd eftir hesi lóg.

**§§ 26, 27, 28**
Hesar ásetingar bólka tey innihaldsligu atlit, ið kunnu og skulu takast í verndar- og friðingarmálum. Higartil hevur eftir gomlu lógini mest verið tikið atlit at vakurleika. Nú verða atlitini meira faklig og mátbar.

**Kap. VI**
Sætti kapittul skipar nærri mannagongdirnar í avgerðarmálum, serliga samskiftið millum fakmyndugleika, lokalmyndugleika og víðari hoyring.

Kapittulin er býttur í fýra partar:

- framferð,
- hoyringar,
- árinskanningar og
- fráboðan

**§ 29 – at taka upp mál**
Umhvørvisstovan ger av, um mál skulu takast upp, men stigtakanin kann koma frá ymsum síðum.

**§ 30 – uppbýti**
Málini byrja gongd sína í náttúruverndarnevndini, ið fyrireikar málini og skipar fyri hoyring og øðrum neyðugum í málinum.

**§ 31 – fyribilsavgerðir**
Málsgongdin eftir lógini kann gerast langdrigin, eins og viðurskifti í sjálvum sær kunnu gera mál átrokandi, tí er neyðugt at kunna taka fyribils avgerðir, ið síðani verða endaliga staðfestar ella broyttar eftir vanligu mannagongdini.

**§ 32 – avgerðir**

Umhvørvisstovan tekur avgerð í avgerðarmálum.

**§ 33 – partar og áhugaði**
Skarin av áhugaðum verður eftir ásetingini sera víður. Hetta tryggjar sjálvsagt kunnleika til og upplýsing av málinum. Afturfyri er neyðugt at hava heimild at enda málsgongdina, sjálvt um ikki øll, ið fevnd eru av lógini, hava gjørt vart við seg.

**§ 34 – víðkað hoyring**
Í málum, ið hava almennan áhuga, ella har tey eftir § 33 eru sera mong í tali ella kunnu hugsast at hava fyrimun av munnligari heldur enn skrivligari hoyring, kann skipast fyri almennum fundum, har hoyrt verður um almennar ætlanir ella einstøk avgerðarmál. Her hava øll, sum hava áhugað í málinum so møguleika at møta, seta spurningar og gera vart við síni sjónarmið.

**§ 35 – árinskanningar**
Saman við støðiskanningum og náttúruverndarætlanum eru árinskanningar tey mest neyðugu amboðini til tess á fakligum grundarlagi at kunna upplýsa, hvørji atlit skulu takast at náttúrvernd í ítøkiligum málum.

**§ 36 – fráboðan**

**§ 37 – uttangarðs og innangarðs** ásetir, at Umhvørvisstovan skal góðkenna tað, tá ætlanin hjá kommunu er, at uttangarðsjørð skal verða fevnd av býarskipan ella byggisamtykt, ella tá festari ella ognarfólk ætlar at leggja inn uttangarðsjørð, skal hetta góðkennast frammanundan av Umhvørvisstovuni. Skilmarkið millum uttan- og innangarðsjørð er lýst í grein 38, stk. 1, nr. 4.

**Kap. VII**
Sjeyndi kapittul skipar nærri ta faktisku fyrisiting, sum vera skal.

Millum fremstu uppgávurnar hjá Umhvørvisstovuni verður at leggja eina náttúruverndarætlan fyri landið alt, eins og økisverndarætlanir í samráð við náttúruverndarnevndina, kommunur, aðrar myndugleikar, borgarar og feløg. Sum er, eru ikki so frægt sum verandi einstøku friðingarnar skrásettar.

Landsverndarætlanin skal tryggja, at sum mest av lívøkjum (biotopum), landsløgum, djóra- og plantulívi verða varðveitt. Til tess krevst ein skráseting av, hvørji løg og sløg eru at finna í Føroyum. Hetta er arbeiði, sum Náttúrugripasavnið hevur arbeitt nógv við, og sum er náttúrligur partur av arbeiði hjá hesum stovni.
So skjótt sum til ber skal Umhvørvisstovan skráseta og kortleggja tey øki, sum talan kann vera um at verja og mæla til, hvat slag av vernd er best egnað og best í samsvar við endamál og atlit í lógini. Hetta eigur at verða gjørt í samstarvi við Náttúrugripasavnið.

Millum høvuðsbroytingarnar í arbeiðslagnum eftir uppskotinum í mun til gomlu friðingarlógina er, at tað skal vera gjørligt í góðari tíð at síggja, hvørji øki, ið ætanin er at varðveita, og hvat tað merkir fyri fólk, vinnu og menning. Á henda hátt er ætlanin, at tað sum mest skal bera til at fyribyrgja friðingarmálum, har atlit at samfelagsmenning og náttúru verða sett upp ímóti hvørjum øðrum. Við at vísa á

verndarøki í góðari tíð, skipa friðing í samráð við myndugleikar, eigarar og brúkarar, og møguliga keypa ella endurgjalda ognir og rættindi, fer tað vónandi at bera til at verja náttúruna meiri miðvíst og samstundis sleppa undan ónáðum fyri borgarar og myndugleikar.
Skráseting og vernd í góðari tíð eru millum fremstu uppgávurnar hjá Umhvørvisstovuni. Talan má tó ikki vera um dupultfunksjónir, og tí er neyðugt, at Umhvørvisstovan og Náttúrugripasavnið arbeiða tætt saman, serstakliga um skráseting av lívfrøðiligum margfeldni.

Umframt Náttúrugripasavnið er Biofar dømi um stovnar ella verkætlanir, sum hava skrásett einstøk djóra- og plantusløg. Slík skráseting kann samskipast við verndarætlanirnar, men helst eru slíkar skrásetingar ov neyvar til, at tað ber til at nýta tær í óbroyttum líki. Umhvørvisstovan skal fyrst og fremst innan ikki ov langa tíð skráseta í høvuðsheitum, hvørji lívøki, landsløg og sløg av lívi, talan kann vera um at verja, so tað ber til at fáa eitt kortlagt yvirlit. Hetta arbeiðis skal byggja á tøkt tilfar, og á tilfar, sum neyðugt er at fáa til vega.

**§ 38 – náttúrvernd**
Umhvørvisstovan skal taka sær av skráseting og kortskipan sum lýst um kap. VII alment. Stovnurin skal eisini umsita teir tjóðgarðar, sum ætanin er at skipa sambært lógini, eins og gøtur og onnur miðvís verndartiltøk.

Stovnurin fær heimild til – innan neyvari játtan – at fara undir tiltøk, ið skulu tryggja vernd.

Gøtur verða nevndar, tí tær ofta eru neyðugar, skulu fólk til gongu í viðbreknum øki ikki óbótaliga skaða náttúruna. Sum dømi kann nevnast, at Mykineshólmur og Slættaratindur verða nógv vitjaðir. Fyri eigarar og brúkarar eins og fyri náttúruna er hetta ein byrða, men til ber møguliga at tryggja øll hesi áhugamál, um Umhvørvisstovan verður við at gjalda fyri og røkja gøtur, upplýsing og annað. Á tann hátt kann bera til, at ferðafólk framvegis kunnu njóta hesi støð, hagarnir framvegis kønnu røkja tey, og at lívsløg verða varðveitt.

Ein miðvísari náttúrvernd fer at kosta pengar. Fyri ein part verður talan um nevndu tiltøk, fyri ein part røkt av tjóðgørðum, fyri ein part endurgjald í sambandi við friðingar, har semja ikki fæst í lag. Uppskotið heimilar eisini, at Umhvørvisstovan fyrireikar – og síðani leggur fyri landstýrismannin eftir mannagongdini um týðandi mál – uppskot um at keypa, leiga ella endurgjalda lendi ella rættindi til tess at fremja náttúruvernd.

Hugsast kann, at landið á henda hátt keypir lendi ella rindar fyri, at brúkið verður skipað innan ávís mørk. Sum dømi kann hugsast, at landið keypir lendi til ferðafólk at savnast á at njóta náttúruna (t.d. útsýnis-, gistingar-, og støðgipláss), keypur lendi at varðveita lívøki (t.d. keypir áir, vøtn, búpláss ella øki annars), ella rindar fyri, at nýtslan einans verður av ávísum slagi í framtíðini (t.d. at bitið verður avmarkað til ávíst tal av djórum, at eigarin ikki veltur, ella júst at landslagið verður hildið ella brúkt á sama hátt sum áður).

**§ 39 – hagar og høv**

Ásetingin skipar nærri skyldu til og heimild fyri at samstarva við ta vinnu og tey áhugabrúk, sum reka meginpartin av jarðar- og havøki Føroya. Ásetingin skal haldast saman við endamáli lógarinnar at tryggja brúk og menning so burðardygt, sum til ber, samstundis sum atlit verða tikin at vinnu, mentan og trivnaði.

**Kap. VIII**
Áttandi kapittul skipar kærumálini. Nýggja lógin byggir á vanligu skipanina nú á døgum. Av tí at fyrisitingardómstólar ikki eru skipaðir í Føroyum, eins og teir eru í grannalondum okkara, eitt nú Svøríki og Finnland, so eru fyrisitingarmál sera tung at føra vegna kostnað og próvbyrðu. Tí eru í staðin kærunevndir skipaðar við skyldu at upplýsa málini og við málsviðgerð, ið er munandi tryggari og bíligari enn tann hjá dómstólunum í sivilum málum. Seinnu árini hevur Kærustovnur Føroya eisini víst seg at vera sera trygg og munagóð skipan at tryggja neyðuga roynd í fyrisitingarmálum. Nýggja lógin gevur landstýrismanninum heimild at lata kærustovnin umsita skrivstovuna hjá kærunevndini.

Gamla skipanin við ongum veruligum óheftum kærumyndugleika og forboð móti dómstólaviðgerð er als ikki nøktandi og má undir øllum umstøðum takast av. Kanningar í samband við lógarfyrireikingina vísa, at avgerðirnar hjá yvirfriðingarnevndini ikki lúka vanligu krøvini í fyrisitingarlógini til nærri grundgevingar, serliga viðvíkjandi fyrisitingarligari meting.

Sjálv kærunevndin er lýst í § 7.

**§ 40 – kærufreistir.**
Freistir mugu vera, men ásetingin tryggjar, at allar kærur verða viðgjørdar, um tað ber til at fáa tær við í kæruviðgerðina, sjálvt um einstaka kæran kann vera ov sein. Eftir vanligum grundreglum verða viðgjørdar kærur, har tann rakti ikki visti um avgerðina ella ikki var vegleiddur um kærumøguleikan. Eisini ber til hjá kærunevndini at taka upp mál, sum eru sera týðandi fyri tann einstaka ella sum fordømi.

**§ 41 – skrivstovan hjá kærunevndini**
Kærustovnurin ella annar stovnur verður sambært hesi áseting skrivstova hjá náttúrukærunevndini.

**§ 42 – málsviðgerð**
Fáar reglur eru at finna um fyrisitingarkærumál. Fyristingarlógin og lógin um innlit eru sjálvsagt galdandi, men fáar reglur eru um fyrireiking, freistir, skyldur og nærri fyriskipan.

Ætlanin við ásetingini um almannakunngerð er (á sama hátt sum við avgerðarsavninum hjá Umhvørvisstovuni) at tryggja, at avgerðir, nevndar við fullum navni hjá pørtunum, staðarnøvnum, knattstøðu, matrikulnummari og øðrum, ið kann eyðmerkja málið so væl sum gjørligt, skulu vera til taks, so rættarstøðan verður so almannakunnug sum gjørligt, bæði hvat viðvíkur fyriskipaðari vernd og friðing, og hvat viðvíkur treytum, lógartulkingum og mannagongdum.

**§ 43 – roynd,** ásetur, at avgerðir hjá náttúrukærunevndini kunnu ikki leggjast fyri landsstýrismannin og eru endaligar innan fyrisitingina.

**Kap. IX**
Nýggjundi kapittul skipar kunngerðarheimildirnar undir einum. Heldur enn í hvørji áseting einsæris at áseta kunngerðarheimildir, eru tær her savnaðar undir einum. Kravið er tó framvegis, at kunngerðir skulu halda seg innan fyri ásetingarnar í lógini.

Heimildin at skipa stovnarnar og ásetingar í kap. I – IV nærri, fevnir um reglugerðir fyri samsýning, arbeiðsbýti, samskipan við aðrar stovnar og aðrar fyriskipanir, sum eru egnaðar og neyðugar at náa endamálum lógarinnar innan teir karmar, sum lógarásetingarnar mynda.

Heimildin nærri at áseta innihaldsligar reglur sambært kap. V, er ætlað at lýsa nærri vernd og friðing, so hvørt venja ella mál geva høvi at lýsa innihaldsligu reglurnar nærri.

Sum dømi kunnu nevnast treytirnar í § 21, sum kunnu skipast nærri. Annað dømi eru tey ymsu lívsløgini (biotypurnar), hvussu tey skulu skilmarkast og finnast ígjøgnum t.d. lyklaplantusløg, hvussu tey skulu verjast, og hvussu tey kunnu nýtast í samsvar við verndina.

Eisini fevnir kunngerðarheimildin um reglur fyri inn- og útflutningi av djórum, plantum og tilfari úr náttúruni.

**Kap. X**
Ásetingarnar um revsing, kravboð og gjøld skulu tryggja, at lógin verður hildin.

**§ 45, stk. 1 og 2 – revsing og sektaruppskot**
Ásetingin heimilar revsing. Tað verður eftir vanligu mannagongdunum ákæruvaldið, ið reisur ákæru, men Umhvørvisstovan fær heimild at seta fram sektaruppskot.

**§ 45, stk. 3 – dagbøtur og rættarkravboð**
Ígjøgnum rættin ber til hjá Umhvørvisstovuni at handhevja avgerðir, áleggingar og boð sambært lógini.

**§ 45, stk. 4 – gjald og trygd**
Ásetingin skal skiljast í samsvar við § 21. Talan kann vera um tiltøk, sum Umhvørvisstovan noyðist at fremja, eitt nú at rudda upp í náttúruni, árinskanningar ella annað, ið onnur av røttum áttu at framt.

**Kap. XI**
Kapittulin skal skipa nærri skiftið frá gomlu til nýggju lógina.

**§ 46 – myndugleikaskifti**
Landsstýrismaðurin fær hervið heimild til nærri at skipa myndugleikaskiftið, eisini nær verandi myndugleikar gevast, og um valskeið teirra verða stytt.

**§ 47 – eldri lóg**

Friðingar eftir eldri lóg skulu samskipast við skráseting og náttúrverndarætlan eftir nýggju lógini. Eldri friðingar skulu, so hvørt orka verður til tess, metast av nýggjum og samskipast eftir nýggju lógini.

Kunngerðir eftir gomlu lógini eru við hesi áseting framhaldandi heimilaðar, til tær eru avtiknar við kunngerð.

**§ 48 – gildi**
Nýggja lógin loysir av gomlu lógina. Sambært gildiskomuregluni kemur lógin ikki í gildi fyrrenn 1. jan 2012. Hetta verður gjørt fyri at geva landsstýri møguleika at raðfesta náttúruverndina inn í komandi fíggjarlógarupskot, og somuleiðis seta neyðug tíð av til at fyrireika umsiting av lógini.

**Á Løgtingi, 1. mars 2011**

| | |
|---|---|
| Bjørt Samuelsen | Hergeir Nielsen |
| løgtingsmaður | løgtingsmaður |